LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Búnaðargrunnurin
Postrúm 50
R. C. Effersøesgøta 4
110 TÓRSHAVN

Tórshavn, tann 17. september 2012
J.Nr.:11/ 201200061 / 18
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

Í skrivi til Løgtingsins umboðsmann, dagfest 13. august 2012 boðar Búnaðargrunnurin frá, at grunnurin á hvørjum ári hevur stongt í summarfrítíðini, og at Búnaðargrunnurin í ár hevur havt stongt frá 23. juli 2012 til 20. august 2012.

Eg haldi tað vera alt annað enn nøktandi, at ein borgari ikki kann koma í samband við Búnaðargrunnin í 4 vikur vegna summarfrí.

Sambært § 16 í innlitslógini ( løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001) og § 16 í fyrisingarlógini (løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg) skal ein almennur myndugleiki sum skjótast gera av, um ein áheitan um innlit kann verða gingin á møti. Verður umbøn um innlit ikki gingin á møti innan 10 dagar, skal myndugleikin boða viðkomandi frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals. Harumframt skal ein myndugleiki, sambært góðum fyrisitingarsiði, svara einari áheitan í rímiligari tíð.

Tað er ein uppgáva hjá leiðsluni at skipa arbeiðið soleiðis, at fyrisitingin virkar á fullgóðan hátt alt árið, sjálvt um starvsfólk halda summarfrí í einum ávísum tíðarskeiði. Hóast tað kann vera torført hjá einum lítlum stovni við 4 fulltíðarstørvum at vera fult virkin í summarfrítíðini, verður stovnurin noyddur at tryggja, at ein umsókn um innlit verður svarað innan fyri ta lógarásettu freistina, ella at ein áheitan verður avgreid í rímiligari tíð.

Eg fari við hesum at heita á Búnaðargrunnin um at broyta sína siðvenju at stongja skrivstovuna í 4 vikur í summarfrítíðini, og lata meg frætta aftur, hvussu grunnurin ætlar at skipa arbeiðið komandi summar.

Av tí at hetta skriv kann hava áhuga fyri aðrar almennar myndugleikar verður avrit av hesum skrivi lagt út á heimasíðu okkara.

Vinarliga

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður

Traðagøtu 43 · Postrúm 2008 · FO-165 Argir · Tlf 358500 · Faks 358501 · lum@lum.fo · www.lum.fo